# Slapp ikki í skúla

**Hósdagin fekk Hannvør Johansen boð frá Almannastovuni um, at stuðulsfólkið hjá soninum ikki verður sett í starv aftur. Tí slapp John Heri ikki í skúla í gjár, og mamman veit ikki, hvat nú kemur at henda**

STUÐULSFÓLK
*Eyðun Klakstein*



Í gjár byrjaði skúlagongdin aftur kring landið. Summi børn eru ivaleyst óhugalig, nú tey skulu byrja aftur, men ein drongur, sum so fegin vildi sleppa í skúla í gjár, slapp ikki.

Tað er John Heri Johansen í Klaksvík, sum skuldi byrja í 6. flokki í skúlanum við Ósánna.

Í farnu viku greiddi mamma hansara, Hannvør, frá støðuni, sum tey eru í og hava verið í, síðani tey fluttu til Føroya fyri nøkrum árum síðani.

John Heri er spastikari, og hann hevur tí brúk fyri praktiskari hjálp, tá hann er í skúla. Hesa hjálp hevur hann fingið frá Almannastovuni, men hon er nú steðgað.

Stuðulsfólkið, sum hevur veitt John Hera hjálp við skúlagongdini seinastu tvey árini, er sagt úr starvið, og stuðulin er steðgaður.

## Langt stríð

Hannvør Johansen hevur enn einaferð í summarferiuni stríðst við at fingið stuðulsfólk til sonin, men hetta hevur ikki eydnast.

Hósdagin fekk hon boð frá Almannastovuni um, at tann stuðulin, sum John Heri hevði fingið til skúlagongd síðani 1999, var endaliga steðgaður.

– Almannastovan er av tí fatan, at Almannastovan ikki hevur heimild til at veita stuðul í skúlanum, og tí er avgjørt, ikki framhaldandi at veita John Heri stuðul til praktiskar uppgávur í skúlatíðini, vóru boðini, sum Hannvør fekk í brævinum.

Almannastovan hevur saman við Sernámsdeplinum roynt at fingið Mentamálastýrið at taka yvir stuðulin til John Hera, men tað er ikki eydnast. Tvey skriv eru send til Mentamálastýrið, men svar er ikki komið.

*– Eg veit ikki, hvat nú kemur at henda. John kann ikki fara í skúla uttan stuðul, men eingin vil veita hendan stuðul. Eg havi stríðst við nógvar almennar stovnar, men tað kemur einki burturúr, sigur Hannvør Johansen, sum mátti hava sonin heima í gjár, tí eingin vil lata stuðulsfólk til skúlagongdina hjá honum*

## Sat eftir heima

Hannvør Johansen og sonurin vóru heima fyrrpartin í gjár, tá onnur fóru í skúla.

– John hevur verið í hesi støðuni fyrr, men hann er keddur av tí, og hann spyr, hvussu verður við bókunum og so víðari, sigur Hannvør.

– Eg veit ikki, hvat nú kemur at henda. John kann ikki fara í skúla uttan stuðul, men eingin vil veita hendan stuðul. Eg havi stríðst við nógvar almennar stovnar, men tað kemur einki burturúr, sigur hon.

Landsstýrismaðurin við almannamálum hevur sett í gongd eina kanning av stuðulsfólkaøkinum, sum hann kallar ein hurlivasi, men hendan kanning hjálpir ikki í verandi løtu Hannvør og soni hennara.

Tey sita heima og vóna, at ein loysn kann finnast, so John Heri sleppur aftur í skúla.



*Ferðafólk vóru fríggjadagin noydd at bíða eftir, at annað av flogførunum hjá Atlantsflog mátti til Svøríkis at skifta ein motor*

# Atlantic hevði maskinbrek

**Ein motorur á leigaða flogfarinum hjá Atlantic Airways mátti skiftast fríggjadagin, og tað hevði við sær seinkingar í flogferðsluni**

Tað kom ólag á flogferðsluna, tá annað flogfarið hjá Atlantsflog mátti gevast at flúgva fríggjadagin.

Orsøkin var, at eitt brek var á einum av motorunum á flogførunum, og brekið var so umfatandi, at motorurin mátti skiftast.

Brekið var staðfest, áðrenn flogfarið hjá Atlantsflog fór á flog úr Aberdeen.

Hóast eini av teimum fýra motorurunum ikki riggaði, var einki til hindurs fyri, at flogfarið fleyg til Malmø í Svøríki, har umvælingin varð gjørd.

Maskinbrekið hevði við sær seinkingar í flogferðsluni, men umvælda flogfarð undir flúgvingina aftur seint fríggjakvøldið.

Atlantsflog eigur tvey flog, men hevur leigað annað flogfarið út. Felagið, sum hevur leigað flogfarið frá Atlantsflog, hevur framvegis brúk fyri tí, og ístaðin fyri at hetta flogfarið varð tikið aftur í summarmánaðunum, avgjørdi Atlantsflog at leiga annað flogfar, meðan summarflúgvingin stendur uppá.

**ek**

# Nú ber til at stápla bingjur

*Hesin stóri trukkurin skal nú bøta um arbeiðsumstøðurnar á havnaøkinum í Klaksvík. Trukkurin kann stápla fleiri bingjur omaná hvørja aðra*



**Leygardagin fekk Skipafelagið Føroyar í Klaksvík nýggjan trukk, sum ger tað gjørligt at stálpa bingjur á tronga havnaøkinum**

PLÁSSTROT
*Eyðun Klakstein*

Skipafelagið Føroyar í Klaksvík hevur nú fingið ein nýggjan trukk, sum ger tað gjørligt at seta bingjur omaná hvørja aðra.

Nýggi stáplarin kemur úr Havn, har hann hevur tænt í fýra ár. Skipafelagið hevur fingið nýggjan stáplara til arbeiðið í Havn, og tí er stóri trukkurin nú komin til Klaksvíkar.

Stáplarin fer at lætta munandi um arbeiðið á bryggjuni í Klaksvík. Tað er trongligt á vestara havnaøki, og nú nýtt virkið verður bygt á økinum, er tað enn minni pláss til bingjur.

Tað hevur verið ein trupulleiki, at eingin hevur havt útgerðina til at stakka bingjur, og tí hava tær tikið óneyðuga nógv pláss, tá tær hava staðið lið um lið.

## Nýggir møguleikar

Nýggi stáplarin hjá Skipafelagnum í Klaksvík skal brúkast í samband við avskiping og lossing, og hann hevur longu verið í sving.

Stáplarin vigar stívliga 70 tons, og hann kann lyfta 45 tons. Hann røkkur at stápla fýra av teimum høgu bingjunum omaná hvørja aðra, og er talan um tær lægru bingjurnar, fær hann stakka fimm slíkar.

Stáplarin fær eisini flutt tær stóru og tungu bingjurnar, og tað fer eisini at lætta um arbeiðið hjá Skipafelagnum.

## Plásstrot

Tað hava leingi verið trupulleikar við plássinum á havnaøkinum í Klaksvík. Virksemið er nógv økt seinnu árini, og tað er farið at ganga undan við plássi.

Í løtuni er gongd í bygginini av einum nýggjum krivjivirki til alivinnuna, og tað fer við nógvum plássi, umframt at virkið fer at hava nógv virksemið við sær á havnalagnum.

Klaksvíkar býráð hevur arbeitt við at fáa meiri havnaøki, og nýggj góðshavn er í gerð í Ánunum. Tað hevur eisini verið tosað um at fylla meiri út á vestaru síðu, men hesar ætlanir eru ikki vorðnar veruleiki enn.

Stáplarin hjá Skipafelagnum bøtir um trupulleikarnar, sum hava staðist av plásstrotinum.



# Væleydnað Kiwanisting

**Eini 500 Kiwanislimir úr Íslandi hava um vikuskiftið verið í Føroyum á Kiwanistingi. Tingið eydnaðist væl, og Kiwanis í Føroyum umhugsar nú at seta á stovn fleiri felagsskapir í Føroyum**

KIWANIS
*Stefan í Skorini*

Formaður í Kiwanis Tórshavn, Sofus Borðoy, er ógvuliga væl nøgdur við tingið, sum var á Hotel Føroyum um vikuskiftið. Hann sigur, at alt gekk eftir ætlan.

Á tinginum skuldu allir felagsskapirnir í Føroyum og í Íslandi leggja fram sína uppgerð yvir farna árið. Harumframt verður ein 1-ára ætlan løgd, har sett verður út í kortið, hvussu hjálpast skal komandi árið. Eisini verður ein longri 5-ára ætlan gjørd.

Kiwanis er ein hjálparfelagsskapur, sum serliga leggur seg eftir at hjálpa børnum við peningagávum ella keypi av lutum.

## Fleiri limir

Sofus Borðoy sigur, at felagsskapurin fegin vil hava fleiri limir. Í hesum sambandi fer Kiwanis í heyst eftir ætlan at seta fleiri felagsskapir á stovn úti um landið.

Enn er Kiwanis bara í Havn, og tí eru flestu limirnir í høvuðsstaðnum, men hetta skal eftir øllum at døma broytast.

Sofus Borðoy heldur, at stórur tørvur er á tí hjálpararbeiði, sum Kiwanis fremur í Føroyum, og tí hevði verið gott við fleiri limum.

Hetta er fyrstu ferð, at Kiwanistingið í umdøminum Ísland-Føroyar er hildið í Føroyum, og ætlanin er, at tingið verður 10. hvørt ár her á landi. Orsøkin er, at íslendarar hava verið so avbera væl nøgdir við fyriskipanina av hesum tinginum.



*Kirkjan var at kalla fullsett fríggjakvøldið, tá Kiwanislimirnir savnaðust har*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fleiri bilførarar tiknir

**Løgreglan í Havn hevur um vikuskiftið tikið nakrar bilførarar fyri at koyra ov skjótt og at koyra við kenning. Harumframt hava ógvuliga nógv verið inni á støðini at sova rúsin av sær**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina var løgreglan í Kaldbakstunlinum og máldi ferðina á bilum. Ein bilførari varð tikin á staðnum fyri at hava koyrt 117 kilometrar um tíman.

Hesin kann vænta sær treytaða frádøming av koyrikortinum, og hann skal tískil upp til nýggja koyriroynd.

Fríggjakvøldið var ein, ið koyrdi á motorsúkklu, so býttur at koyra alt ov skjótt í túninum hjá løgreglustøðini.

Maðurin á motorsúkkluni varð tikin í Jónas Broncksgøtu, har politistøðin liggur. Ferðin varð máld at vera 90 kilometrar í bygdum øki, og hetta er eisini nóg mikið til, at førarin fær treytaða frádøming av koyrikortinum.

Tíðliga sunnukvøldið var enn ein bilførari tikin. Hesin hevði sett seg við róríð við kenning, og tí varð blóðroynd tikin av føraranum.

Annars verður sagt av løgreglustøðini, at ógvuliga nógv hava verið á støðini og sovið rúsin av sær. Síðan fríggjadagin hava átta full fólk verið inni í klivanum.

# Eldur í sethúsum í Klaksvík

**Fríggjanáttina kom eldur í eina tekju á einum sethúsum á Víkavegi á vestursíðuni í Klaksvík. Eldurin varð bastur beinanvegin**

ELDUR
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina trý korter til trý varnaðust nakrir dreingir, ið koyrdu í bili, at eldur var komin í eini sethús á Víkavegnum. Login stóð úr tekjuni, og teir boðaðu frá beinanvegin.

Klaksvíkar Sløkkilið kom á staðið sum skjótast og fekk tamarhald á eldinum rættiliga skjótt.

Í húsunum lógu kona, maður og børn í fasta svøvni og varnaðust einki. Tey vóru fingin úr húsunum, meðan sløkkiliðið gjørdi sítt arbeiði.

Eldurin slapp ongantíð at breiða seg, og tí kundi familjan fara aftur í húsini at sova aftaná.

Hildið verður, at orsøkin til eldin er, at menn høvdu brent tjørupapp á tekjuna sama kvøldið. Tá arbeiðsmenninir eru lidnir og hava riggað av, er eldur komin í.


## Fólk til Installatiónsdeildina á Føroya Tele

"At stúran drepir fleiri fólk enn arbeiði, kemur av, at fleiri fólk stúra enn arbeiða"

Robert Frost



Søkt verður eftur fólki til Installatiónsdeildina á Føroya Tele at byrja skjótast gjørligt.

Fólkið, ið søkt verður eftir, skal í stóran mun arbeiða við installatión (nýgerð og broytingum) av tekniskari útgerð innanhýsis á Føroya Tele. Arbeiðið er so gott sum alt innandura, og arbeitt verður um alt landið.

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:**
nýgerð og viðlíkahald av tekniskari útgerð og installatión av
· Abbonenttrinum
· Transmissiónsútgerð
· ISDN
· ADSL
· Veikstreymsveitingum
· Køliskipanum
· Alarmyvirføringum
· annað fyrifallandi

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Elektrikari ella líknandi og/ella hollar viðkomandi royndir. Koyrikort krevst.

Arbeitt verður út frá Føroya Tele í Tórshavn.

Starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera opin og duga væl at samstarva. Eisini vænta vit EDV-førleika á brúkarastøði.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Åge Davidsen, deildarleiðara, tel. 243216 ella Starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. august 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!